# Ársaðalfundur í P/F Atlantic Petroleum

**Boðað verður við hesum til ársaðalfund í P/F Atlantic Petroleum at verða á Hotel Føroyum, Oyggjarvegur 45, 100 Tórshavn, leygardagin tann 19. mars 2011 kl. 10.00**

**VIÐ HESI FUNDARSKRÁ:**

**1 Val av fundarstjóra**

**2 Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári**

**3 Framløgu av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar**

**4 Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin og ársfrágreiðing**
*Nevnd felagsins mælir til, at avlopið sambært góðkenda roknskapin verður flutt fram til næsta ár.*

**5 Val av nevnd**
*Tveir nevndarlimir standa sambært viðtøkunum fyri vali fyri eitt 2 ára skeið, nevniliga: Birgir Durhuus og Poul Mohr. Nevndin skjýtur upp afturval av teimum nevndarlimum, ið standa fyri vali.*
*Harumframt hevur nevndarlimurin Mortan Johannesen boðað felagnum frá, at hann, hóast hann ikki stendur fyri vali fyrr enn til næstkomandi ársaðalfund, ynskir at fara úr nevndini til henda ársaðalfundin. Tí skal ein nýggjur nevndarlimur veljast fyri hann fyri eitt 1 ára skeið og skjýtir nevndin upp at velja: David Archibald MacFarlane,Templeton Farm, Strachan, Aberdeenshire, AB 31 6LN, UK.*

**6 Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin**
*Grannskoðari felagsins er Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT løggilt grannskoðaravirki, R.C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn. Nevndin skjýtur upp afturval av verandi grannskoðara felagsins at sita til næsta ársaðalfund.*

**7 Heimild til nevnd felagsins til at keypa egin partabrøv**
Nevndin skjýtur upp at aðalfundur felagsins heimilar nevnd felagsins til felagsins vegna í tíðarskeiðnum frá 19. mars 2011 til 19. september 2012 at keypa egin partabrøv. Nevndin kann felagsins vegna í mesta lagi keypa egin partabræv upp til tað punkt har áljóðandi virðið á øllum teimum egnum partabrøvum, sum felagið eigur, er 10% av áljóðandi virðinum av partapeningi felagsins og hetta til ein kurs, sum ikki kann víkja meiri enn 10% frá noteraða kursinum á partabrøvum felagsins ið handlaði verða á børsmarknaðinum hjá NASDAQ OMX í Keypmannahavn tá keypt verður.

Samtykt um at veita felagnum heimild til at keypa egin partabrøv er áður skrivað inn í viðtøkur felagsins sum § 3A, men tá henda fór úr gildi tann 31. desembur 2005, verður henda viðtøkugrein 3A at strika.

**8 Yvirskipaðar leiðreglur fyri incitamentssamsýning til nevnd og stjórn**
Nevnd felagsins hevur viðtikið yvirskipaðar leiðreglur fyri incitamentssamsýning til nevnd og stjórn og skulu hesar leiðreglur viðgerðast og góðkennast av aðalfundi felagsins. Hesar leiðreglur, ið eru fylgisskjal til dagsskránna fyri aðalfundin, liggja frammi á skrivstovu felagsins og eru tøkar á heimasíðu felagsins.
Verða leiðreglurnar góðkendar av aðalfundinum, verður henda áseting innskrivað í § 16 í viðtøkur felagsins:
*„Gjørdar eru yvirskipaðar leiðreglur fyri incitamentssamsýning til nevnd og stjórn. Hesar leiðreglur eru samtyktar á aðalfundi felagsins og almannakunngjørdar á heimasíðu felagsins."*

Síðani verða leiðreglurnar sum skjótast almannakunngjørdar á heimasíðu felagsins *www.petroleum.fo* við tilskilan av, nær aðalfundurin hevur góðkent leiðreglurnar.

**9 Viðtøkubroytingar**
Harumframt ynskir nevndin at skjóta upp hesar broytingar í viðtøkum felagsins:

A Í § 16 í viðtøkunum ynskist talið á nevndarlimum í felagnum broytt frá at vera „5" til at vera „í minsta lagi 4 og í mesta lagi 7" og konsekvensrætting í turnusskipan í tí sambandi broytt frá: *„2 limir annað hvørt ár og 3 limir annað hvørt ár. Fyrstkomandi vanliga aðalfundin eftir stovnan av felagnum, standa tveir limir fyri vali og verður við lutakasti millum nevndarlimirnar gjørt av hvørjir hesir eru"* til: *"eftir turnusskipan, hareftir teir nevndarlimir, hvørs 2 ára valskeið rennur út, standa fyri vali"* og

B í somu grein ynskir nevndin at hækka heimild sína til sjálv at áseta nevndarsamsýning sína úr hægst loyvda talinum: „kr. 1.000.000,00" til hægst loyvda talið: „kr. 1.500.000,00".

Sum er, er § 16 soljóðandi:
*Nevnd felagsins hevur 5 limir.*

*Vanligi aðalfundur felagsins velur nevndina og verða limirnir valdir fyri 2 ár í senn, 2 limir annað hvørt ár og 3 limir annað hvørt ár. Fyrstkomandi vanliga aðalfundin eftir stovnan av felagnum, standa tveir limir fyri vali og verður við lutakasti millum nevndarlimirnar gjørt av hvørjir hesir eru. Afturval er loyvt.*

*Nevndin skipar seg sjálv og skal seta stjórn við einum ella fleiri stjórum til at stjórna dagligu leiðsluna av felagnum.*

*Nevndarlimir fáa samsýning fyri nevndararbeiði sítt og verður henda at áseta av nevndini, tó so, at samlaða nevndarsamsýningin til allar nevndarlimirnar fyri eitt ár ikki kann fara uppum kr. 1.000.000 uttan loyvi frá aðalfundi felagsins."*

Samsvarandi hesum verður skotið upp at verandi § 16 í viðtøkum felagsins, verður broytt til at vera soljóðandi:

*„Nevnd felagsins hevur í minsta lagi 4 og í mesta lagi 7 limir.*

*Vanligi aðalfundur felagsins velur nevndina og verða limirnir valdir fyri 2 ár í senn eftir turnusskipan, hareftir teir nevndarlimir, hvørs 2 ára valskeið rennur út, standa fyri vali. Afturval loyvist.*
*Nevndin skipar seg sjálv og skal seta stjórn við einum ella fleiri stjórum til at stjórna dagligu leiðsluna av felagnum.*
*Nevndarlimir fáa samsýning fyri nevndararbeiði sítt og verður henda at áseta av nevndini, tó so, at samlaða nevndarsamsýningin til allar nevndarlimirnar fyri eitt ár ikki kann fara uppum kr. 1.500.000,00 uttan loyvi frá aðalfundi felagsins."*

Til samtyktar av uppskotinum til viðtøkubroyting omanfyri krevst smb. § 30 stk. 3 og § 78 stk. 1 í partafelagslógini, at uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og av tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum.

**10 Ymiskt**

Sosialurin 341800

**Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum**
Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum fer fram umvegis heimasíðu felagsins www.petroleum.fo ella á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn ella á tlf nr. + 298 350 100 og/ella telefax nr. + 298 350 101.

Seinasta freist fyri bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum er mánadagin tann 14. mars 2011 kl. 16.00.

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva øðrum skrivliga fulltrú til at møta tygara vegna. Á heimasíðu felagsins www.petroleum.fo, umframt á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn, kunnu tygum útvega tygum eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi.

**Ársroknskapurin 2010 og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum**
Ársroknskapurin 2010 við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing og dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum koma at liggja frammi á skrivstovu felagsins Gongin 9, 100 Tórshavn í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Partapeningur, atkvøðurættur og kontoførandi peningastovnur**
Partapeningur felagsins er kr. 262.670.300 býttur sundur í partabrøv á kr. 100 og multipla av hesum.

Í § 5 stk.1 í viðtøkunum er ásett, at partaeigararnir hava 1 atkvøðu fyri hvørjar kr. 100 teir eiga í partapeningi.

Í § 2 stk. 2 er ásett, at eingin partaeigari kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20% av atkvøðunum.

§ 11 í viðtøkum felagsins er soljóðandi:

*„Hvør partaeigari hevur rætt til at møta á aðalfundinum, um viðkomandi í seinasta lagi 5 dagar frammundan aðalfundinum hevur biðið felagið um atgongumerki.*

*Atkvøðurætt á aðalfundinum hava partaeigarar, sum í seinasta lagi 5 dagar undan aðalfundinum hava biðið felagið um atgongumerki og atkvøðuseðil.*

*Partaeigari kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.*

*Atgongd til aðalfundin hava harumframt fjølmiðlarnir."*

Felagið hevur kosið sær Eik Banki Føroyar P/F til kontoførandi peningastovn og kunnu parteigarar felagsins venda sær til henda peningastovn á adressuni Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn ella á heimasíðuni www.eik.fo ella á telefon nummar + 298 348 000 fyri at útinna fíggjarligu rættindi síni í felagnum.

**P/F Atlantic Petroleum**
**Nevndin**

**www.petroleum.fo**

**ATLANTIC PETROLEUM**